

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 11 - 2011

# Grønlendska landsstýrið fegnast um oljuboring

Fyrr í dag kunngjørdi skotska oljufelagið Cairn Energy, at tað hevur rakt við goymslusand í einum av sínum brunnum í Vesturgrønlandi. Hetta eru góð tíðindi heldur í hvussu er grønlendska landsstýrið, sum í kvøld ger viðmerkingar til seinastu fráboðanina hjá skotska oljufelagnum. landsstýrið staðfestir í einum tíðindaskrivi, at fráboðanin frá Cairn er sera áhugaverd, tó at tað enn er ov tíðlig at gera nakra niðurstøðu. Tað er eingin ivi um, at uppdagingin av sandløgum og goymslumøguleikum er orsøk til bjartskygni fyri okkum øll. Tað er lovandi, men vit mugu gera okkum út við tolni, nú sandlagið skal kannast, um tað goymir olju og gass, sigur Ove Karl Berthelsen, ráðharri fyri vinnu og tilfeingi. Tað má sigast, at hesi tvey seinastu árini við boringum av tilsamans 8 brunnum higartil hava verið sera væleydnað. Cairn hevur prógvað, at tað letur seg gera at bora fleiri brunnar í eini sesong í arktiskum øki um somu tíð sum øll atlit verða tikin til tað viðkvæma umhvørvið við Grønland. Leitingin hevur higartil havt við sær, at savnaðir er ein rúgva av týðandi upplýsingum úr undirgrundini, sum hava stóran týdning fyri komandi leitingina í Grønlandi. Hetta er enn eitt prógv um, at rikni loyvispolitikkurin hevur verið væleydnaður, sigur landsstýrismaðurin. Cairn setti út í kortið fyrr í ár at bora tilsamans 5 brunnar vestan fyri Grønland, og arbeiðið er framvegis í gongd. Cairn boraði tríggjar brunnar í 2010.

